# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tillukku til HB og Havnina

Landskappingin í fótbólti er av á hesum sinni. Í Vodafondeildini er rómurin størstur í høvuðsstaðnum. Og tað er vælskiljandi. Bæði tey gomlu Havnarliðini, HB og B36 fegnast um síni úrslit, sjálvt um annað merkir gull og hitt botnplássið í bestu deildini.

HB gjørdist uppiborið nr. 1 og vann harvið gull fyri 20. ferð í søgu tess. Og fyri Havnina, sum hátíðarheldur 100 ára haldið sum kommuna, er tað eisini ein sigur at staðfesta, at aldargamla liðið hjá havnarfólki, HB kundi vinna gull fyri 20. ferð men eisini gerast landsins besta lið á 100 ára haldinum hjá kommunu tess. Tískil fara vit at ynskja HB og Tórshavnar Kommunu tillukku.

At hitt havnarliðið, B36 eisini vann ein sigur í 100 ára kommunuhaldi tess, ivast neyvan nakar í. Serstakliga ikki B36 viðhaldsfólk, sum eina langa løtu óttaðust ta ringastu vanlukku, sum kundi henda, nevniliga, at hetta heiðursmerkjarandaða felag skuldi flyta niður í næstubestu deildina.

Leingi var vandi fyri, at B36 endaði í 1. deild, men lagnan ella virkisfýsni hjá B36 vildi tað so, at felagið júst rakk til eitt framhaldandi pláss í bestu fótbóltsdeildini. Við hesum ynskja vit eisini B36 tillukku.

Tá tað er sagt, so kunnu vit hinvegin vera vónsvikin av at staðfesta, at eitt annað góðu gomlu liðunum, KÍ mátti tungu leiðina niður í 1. deild. Hetta er so ein partur av spælinum, at vandin altíð lúrir – at tú kanst rykkja niður. Einki er nøkur sjálvfylgja her í lívinum og serstakliga ikki at vera fastur luttakari í landsins bestu fótbóltsdeild, Vodafondeildini. Fyri norðingar og her ikki minst klaksvíkingar er 2009 eitt skaðaár, tá tað um fótbólt ræður. At gamli høvdingin í føroyskum fótbólti fyri fyrstu ferð mátti ikki bert lúta men flyta niður í næstbestu deildina man kennast bæði mannminkandi og ærumeiðandi. Men soleiðis eru also treytirnar. Øll fótbóltsáhugað munnu kenna tað svárt, at KÍ ikki er við í oddinum komandi ár. Vit vóna til tað besta fyri KÍ í 2010. Hin stóri taparin gjørdist 07Vestur, sum hóast nógvar góðar dystir og góðar leikarar eisini mátti lúta. Tað, sum sjálvandi er spell, er, at Fótbólts-Føroyar eru tvær oyggjar fátækari komandi kappingarár, Borðoy (les Norðoyggjar) og Vágar. Men vit mugu so staðfesta, at somu Fótbólts-Føroyar eru tvær aðrar oyggjar ríkari, nevniliga Suðuroy og Sandoy. Tillukku VB-Sumba og B71.

Sjálvandi eru tað úrslitini, sum telja. Hinvegin eiga vit ongantíð at gloyma tann trivnaðarliga, sosiala og mentanarliga týdning, sum tað hevur fyri búplássini kring landið, at teirra øki er umboðað í landsins bestu fótbóltsdeild. Tað er helst tey, sum halda, at Eysturoyggin er yvirumboðað við fimm liðum í Vodafondeldini. Men soleiðis eru treytirnar. Tað prógvar bara, at eysturoyingar hava vilja og dirvi og eru dugnaligir. Teir fingu bæði silvur og bronsu. Vit skulu so heldur ikki gloyma, at Eysturoyggin er undangongu- og vinnaraoyggj, eitt nú tá tað umræður vinnulívið. Nógv eru góðynskini og vilja vit eisini ynskja Rás2 tillukku við 2 ára degnum í dag og tí óføra dekninginum av fótbòltinum í summar. Einki minni enn gull vert.

**Sosialurin**

## Ódeyðiligu fiskiloyvini hjá Heina



**BJARTI THOMSEN**
Nólsoy

Heini, skyldmaðurin í Kunoy, hevur mangan víst á ódeyðilig fiskiloyvi. Sipað verður til, at skipaflotin ikki minkar samsvarandi teimum fækkandi fiskidøgunum. Eg eri púra samdur við Heina. Eg haldi, at hetta er bert ein av fleiri veikleikum í okkara fiskidagaskipan.

Eitt dømi um ódeyðilig fiskiloyvi sæst í línuflotanum. Nú mælir formaðurin fyri línuskip til upphøggingarskipan, so línuskipini kunnu fækka. Dagarnir í bólkinum eru skerdir, og nú er ov smábýtt til tey 24 skipini. Dagatalið hóskar til 17 skip, men onki skip fer úr flotanum. Orsøkin er, at fiskiloyvið í sjálvum sær verður mett at hava stórt virði. Hetta 'neyðarrópið' frá formanninum fyri línuskip eigur at verða tikið í álvara av øllum pørtum í vinnuni. Eg havi í lesarabævi í juni í ár víst á møguleikan at senda línuskip út í verð sum menningarstuðul. Lína er umhvørvisvinarlig og lítið orkukrevjandi og tí tiltalandi veiðireiðskapur.

Ein annar veikleiki í okkara fiskidagaskipan er, at hon ikki forðar ovveiðu av ávísum fiskasløgum. Toskur hevur seinnu árini haft framúr góðan prís, og tí verður hann tráðroyndur. Í longri tíð hava vit hvørt ár tikið annanhvønn tosk úr havinum. Lívfrøðiliga burðardygga tilmælið er at taka í mesta lagi triðja hvønn fisk. Tað mest skynsama og búskaparliga burðardygga er at taka í mesta lagi fjóðrahvønn tosk úr stovninum hvørt ár. Tíbetur sær út til, at biologiska framleiðslan á føroyska landgrunninum hevur verið framúr í ár, og nógvur toskamurtur er at síggja. Vónandi ber til at laga veiðitrýstið, so stórur partur av hesum fiski kann vaksa og seljast sum stórur dýrur toskur.

Seinastu dagarnar hevur stjórin á Havstovuni fingið harðar ákoyringar, tí hann hevur dittað sær at siga, at fiskidagaskipanin ikki virkar sum ætlað. Tað er ikki ókent, serliga undir harðrendum valdsharrum, at tá ring boð koma, verður boðberin avrættaður, heldur enn at boðini verða tikin til eftirtektar. Hetta er stuttskygdur politikkur og førir til undirgang sum frá líður. Eg havi ilt við at síggja, hví so stór andsøgn er millum fiskimenn og fiskifrøðingar. Allir hava sama mál, í hvussu er upp á longri sikt; at fáa so nógv burturúr fiskastovnunum sum gjørligt. Tað eigur tí at bera til at samstarva, so okkara sermerkta fiskidagaskipan kemur at rigga sum ætlað.

## Hækkandi ferðaavgjøld og minkandi ferðsla

**Atlantic Airways mælir frá, at Vága Floghavn hækkar fleiri avgjøld í sambandi við flúgving um flogvøllin í Vágum, tí hetta fer at minka um áhugan at flúgva um flogvøllin**

*Tíðindaskriv frá Atlantic Airways*

Hóast avgjøld til Vága Floghavn ikki eru hækkað seinnu árini, eru samlaðu inntøkurnar til Vága Floghavn øktar munandi, tí talið á ferðafólki um Vága Floghavn er vaksið nógv, eins og Vága Floghavn hevur fingið munandi inntøku burtur úr sáttmálanum um tollfría sølu í Vágum.

Harumframt rinda tey ferðandi ein beinleiðis skatt í landskassan upp á 130 kr. gjøgnum ferðavgjaldið, sum ikki verður broytt, nú avgjøld til Vága Floghavn eftir ætlan hækka.

Tá gjøldini fyri at ferðast um flogvøllin hækka munandi, er tað beinleiðis í andsøgn við ynskini um at skapa meiri ferðslu, fortreytir fyri bíligari flogferðum og meiri fjøltáttaðum ferðasambandi við umheimin.

**Ásetingin um hægri avgjøld fer at hava við sær:**

- dýrari ferðaseðlar fyri hvønn einstakan ferðandi
- Føroyar fara at teljast millum londini í Evropa við dýrastu avgjøldunum
- færri ferðandi úr Føroyum vegna hægri prísir
- færri ferðandi til Føroya, tí kappingarførið mótvegis øðrum alternativum ferðamálum er versnað
- minkandi umsetning og inntøku í føroyskari ferðavinnu sum heild

Í uppskotinum til broyting í avgjøldum er lagt upp til eina hækking upp á 55 kr. fyri hvønn ferðandi í avgjøldum umframt aðrar hækkingar, sum eisini fara at tyngja flogvinnuraksturin.

Tá myndugleikarnir gera av at hækka avgjøld fyri tann ferðandi í Vágum ella í Kastrup, fer rokningin beinleiðis til tann ferðandi, sum tí upplivir hetta sum eina príshækking.

Royndirnar aðrastaðni vísa, at ein hækking av ferðaprísum upp á 10% elvir til minst líka stórt fall í ferðafólkatalinum ella størri. Slíkt tiltak fer tí at elva til fallandi inntøkur til Vága Floghavn, fallandi inntøkur til flogferðsluna og ikki minst eisini fallandi inntøkur í føroyskari gistingar- og ferðavinnu. Hetta hava mong onnur ferðamál í Europa skilt, og tí hava tey lækkað gjøldini og hækkað íløgurnar í marknaðarføring til tess at økja samlaðu inntøkurnar hjá øllum pørtum við einum vaksandi streymi av ferðafólki.

Tað er okkara sannføring, at verða uppskotnu hækkingarnar í avgjøldum sett í verk, so fer tað at kosta føroyska búskapinum inntøkur og arbeiði..

Í uppskoti eru eisini ásetingar um munandi hægri avgjøld fyri upplating av flogvølli og avgreiðslu av tyrluflúgving í sambandi við frálandavinnu.

Bæði hesi tiltøk fara at darva menningini av arbeiðsplássum kring flogferðslu.

Atlantic Airways heitir tí á landsstýrið um ikki at seta hesar príshækkingar í verk ella at minka ferðaavgjaldið til landskassan samsvarandi, so kostnaðurin fyri hvønn einstakan verður tann sami sum fyrr.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.